# Ford Verve í Frankfurt


Konseptbilurin Ford Verve verður frumsýndur á Frankfurt Motor Show

**Konseptbilurin Ford Verve, sum verður frumsýndur á Frankfurt Motor Show um hálvan september, er ein rættuliga sermerktur hatchback við trimum hurðum við nýggja »Kinetic Design« stílinum hjá Ford**

BILAR
*Maguns Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ein av mest áhugaverdu bilunum á Ford básinum á Frankfurt Motor Show verður Ford Verve, sum er ein konseptbilur í Fiesta-klassanum. Ein sermerktur hatchback við trimum hurðum við nýggja Kinetic Design stílinum hjá Ford.

Sambært Ford verður designið framman, við stóra opna kølaragittarinum, nakað sum kemur at eyðkenna fleiri av nýggju Ford-modellunum, sum fara at koma á marknaðin. Ford Verve er eins sermerktur innan sum uttan. Alt er í nýggja stílinum hjá Ford.

Endamálið við at sýna bilin fram á Frankfurt Motor Show er at leggja til merkis, hvussu tey vitjandi taka ímóti bilinum, siger John Fleming, stjóri hjá Ford í Evropa.

Ford fara eisini at sýna fram ein Ford Focus ECOnetic, sum verður ein tann mest umhvørvisvinarligi bilurin, tá hann kemur á marknaðin fyrst í 2008. Í nærmastu framtíð kemur eisini ein heilt nýggjur Ford Focus og seinni ein nýggjur Ford Ka.


Ford Verve er eins sermerktur innan sum uttan í nýggjum stíli


Designið framman við stóra opna kølaragittarinum verður nakað sum kemur at eyðkenna fleiri av nýggju Ford-modellunum


Ford Verve er ein rættuliga sermerktur hatchback við trimum hurðum við nýggja »Kinetic Design« stílinum hjá Ford

# Volvo S80 tryggast

**Insurance Institute for Highway Safety í USA hava kosið Volvo S80 sum »Top Safety Pick 2007« fyri sínar framkomnu og intelligentu trygdarskipanir**

BILAR
*Maguns Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í USA er Volvo S80 heiðraður av IIHS (Insurance Institute for Highway Safety) fyri sína trygd við samanstoytir, bæði framman, aftan og frá síðuni. Í hesum sambandi varð S80 kosin »Top Safety Pick 2007«, sum tann bilur, ið best verjir tey ferðandi í bilinum.

Í grundgevingunum verður sagt, at Volvo S80 hevur nógvar framkomnar og intelligentar trygdarskipanir sum t.d. Adaptive Cruise Control (ACC), sum er ein radarsensor til at halda trygga frástøðu til framman fyri koyrandi bilar, Collision Warning (CW), sum minkar um vandan fyri einum samanstoyti, Blind Spot Information System (BLIS), sum registrerar og ávarar um onkur í ferðsluni nærkast bilinum úr einum blindum vinkli, Intelligent Driver Information System (IDIS), sum tryggjar at bilførarin ikki verður ørkymlaður í stressaðum umstøðum við t.d. at skipanin kann afturhalda telefonsamrøður ella sms boð undir koyring, og Active Bi-Xenon Light, har forlyktirnar fylgja vegnum, so útsýnið altíð verður so gott sum gjørligt á myrkum og krókutum koyribreytum.



Volvo S80 heiðraður av IIHS (Insurance Institute for Highway Safety) fyri sínar framkomnu og intelligentu trygdarskipanir